

# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo





NÝTT Í SOSIALINUM

FOKUS Á VINNULÍVIÐ

Fyri at seta fokus á vinnulívið,
fer Sosialurin einaferð um mánaðin
at hava eitt vinnulívsinnlegg í blaðnum

Tey, ið ynskja at lýsa á hesum síðum,
kunnu venda sær til marknaðardeildina:
lysing@sosialurin.fo ella ringja 34 18 00

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO




UTTAN ÚR HEIMI

# Hvørjir eru teir?

**Útlendskir ríkis- og stjórnarleiðarar eru nú drignir upp í amerikanska valstríðið. Spurningurin er, hvør stuðlar hvørjum valevni**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*– Eg fái stuðul frá útlendsku≤m leiðarum, sigur John Kerry. Hvørjir eru teir, spyr Bush*

Hvørjum halda útlendskir ríkis- og stjórnarleiðarar við, George W. Bush ella John Kerry?

Hesin spurningurin hevur tikið seg upp í valstríðnum upp undir amerikanska forsetavalið í heyst. Upprunin til orðaskiftið er, at John Kerry skal hava sagt, at hann fær stuðul frá fleiri leiðarum í øðrum londum, sum heldur vilja hava hann til forseta enn George W. Bush.

Sjálvur sigur Kerry, at tað er ikki hann, sum hevur lagt upp til orðaskiftið, men at Bush og hansara menn hava tikið spurningin upp fyri at sleppa undan at viðgera spurningar um arbeiðsloysið, heilsuverkið og onnur týðandi mál í valstríðnum.

– Tað er einki loyndarmál, at summi lond hava verið ímóti uttanríkispolitikkinum hjá sitandi stjórnini. Tað hevur kostað okkum virðing og ávirkan í heiminum. Eg standi við tað, sum eg havi sagt. Tað týdningarmesta er, at uttanríkispolitikkurin hjá Bush-stjórnini hevur ikki gagnað trygd okkara, soleiðis sum hann átti at havt gjørt, sigur John Kerry við tíðindastovuna AP.

George W. Bush, forseti, og Colin Powell, uttanríkisráðharri, vilja ikki leggja John Kerry undir at lúgva, at hann fær stuðul frá útlendskum leiðarum, men teir vilja fegnir hava at vita, hvørjir hesir leiðararnir eru.

– Annaðhvørt sigur hann okkum, hvørjir hesir leiðararnir eru, ella má niðurstøðan vera, at hetta er nakað, sum hann hevur funnið uppá, sigur Colin Powell.

John Kerry hevur sýtt fyri at kunngera nøkur nøvn, men hann heldur upp á sítt.

# Ikki nóg mikið at taka bin Laden

**Franskir hermenn hava fleiri ferðir verið nær Osama bin Laden, men ovasti teirra heldur ikki, at tað fær nakran avgerandi týdning, at bin Laden verður tikin**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*– Tað er ikki nóg mikið at fáa fatur á bin Laden. Verður hann tikin, kemur ein annar í hansara stað*

– Taka vit ein av leiðarunum í al-Qaeda, kemur ein annar framat, sigur generalurin Henri Bentegeat við útvarpið Europe 1.

Hann er ovasti í franska herinum og stendur á odda fyri 200 servandum fronskum hermonnum, sum leita eftir leiðaranum í al-Qaeda, Osama bin Laden, í fjøllunum á markinum ímillum Pakistan og Afghanistan.

Generalurin sigur við Europe 1, at fleiri ferðir hevur tað verið um reppið, at hermenn hansara hava tikið bin Laden.

– Men hvørja ferð er hann sloppin undan okkum, sjálvt um vit hava byrgt hann inni. Landslagið í Afghanistan er soleiðis háttað, at tað kemur tí flýggjandi til góðar, sigur Henri Bentegeat, generalur.

Hann ávarar samstundis fólk ímóti at leggja ov stóran týdning í tað, verður bin Laden tikin, tí maður kemur í mans stað, sigur hann. Hann leggur afturat, at tað mest órógvandi er, at al-Qaeda forvinnur altsamt meiri og meiri pengar burtur úr handli við rúsevnum.

# Ov fáir jødar í Ísrael

**Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, vil hava eina millión jødar í øðrum londum at flyta til Ísraels næstu árini. Spurningurin er bara, hvaðani teir skulu koma**

ÍSRAEL
*Árni Joensen.*
*fartekst@mail.dk*

Fyri nøkrum døgum síðani boðsendi Ariel Sharon fleiri ráðharrum og serfrøðingum av ymsum slagi til fundar. Evnið var, hvat kann gerast fyri at fáa umleið eina millión jødar í øðrum londum at flyta til ísraels tey næstu árini. Tað skrivar blaðið Haaretz.

Sambært blaðnum kom fundurin ikki til nakra beinleiðis niðurstøðu, men avgjørt varð, at stjórnin skal leggja eina ætlan, sum skal viðgerast á einum fundi, sum verður í juni.

Hagtølini hjá ísraelsku myndugleikunum vísa, at í fjør fluttu 24.434 fólk til Ísraels. So lítil hevur tilflytingin ikki verið síðani í 1989, og higartil í ár eru bert 2.650 útlendskir jødar fluttir til landið. Sambært Haaretz hava embætismenn hjá stjórnini roknað seg fram til, at í besta føri kann talið á innflytarum fáast upp á umleið 70.000 í 2010.

Tá Sovjetsamveldið syndraðist, valdu nógvir jødar í Russlandi og øðrum fyrrverandi sovjetlýðveldum at flyta til Ísraels, men nú vísa hagtølini, at minst 50.000 jødar eru fluttir aftur til Russlands. Orsøkin er sambært Haaretz, at tilflytararnir hava havt ilt við at fáa arbeiði, og at viðurskiftini í Ísrael eru ikki nóg trygg. Harafturat er tað ein veruleiki, at tað eru ikki allir ísraelsmenn, sum halda so nógv av tilflytarunum.

Orsøkin til ætlanina hjá Sharon og stjórnini at fáa fleiri útlendskar jødar til Ísraels er, at jødarnir eru í ferð við at koma í minniluta í økinum. Framrokningar hjá myndugleikunum vísa, at um tíggju ár verða fleiri palestinar enn jødar í tí gamla Palestina, sum í dag umfatar Ísrael, Vestara Áarbakka og Gaza-geiran.

Eisini í sjálvum Ísrael er tann jødiski parturin av fólkatalinum minkandi. Í dag eru 1,7 millión ísraelskir ríkisborgarar muslimar, og meðan jødiski parturin av fólkinum vaks 1,4 prosent í fjør, vaks tann muslimski parturin 3,4 prosent.



*Útlendskir jødar aftra seg við at flyta til Ísraels, tí tað er ikki nóg trygt at búgva har. Samstundis rýma russiskir jødar heimaftur*